

*Meðan Jastrid Gullaksen, grafikari, og Jóhanna á Tjaldrafløtti, høvundur, greiða frá arbeiðnum við "Lættogleskiligt" og nú eisini "Søtt og leskiligt", rungar láturin ofta*

*Mynd Jens KristianVang*

væl. Tað liggur sanniliga eisini nógv hart arbeiði aftanfyri allar tríggjar bøkurnar, leggur Elisabeth afturat.

### Heilsugott ella søtt?

Spurdar um tað ikki er ein andsøgn at koma við eini køkubók eftir allan tann heilsugóða matin, svarar Johanna avgjørd.

– Nei, tað haldi eg ikki. Vit hava báðar undirvíst í heilsugóðum mati í nógv ár, og vit hava altíð lagt dent á, at tað saktans kann vera munur á gerandismati og veitslumati. Og tað var eingin slík kakubók í Føroyum, tá vit fóru undir "Søtt og leskiligt".

– Nú kom Oddvør so eisini við eini kakubók, júst tá vit komu við okkara. Men bøkurnar eru so ymiskar, at man gott kann ogna sær báðar, vísir Elisabeth á.

– Eg var ein av teimum fyrstu at keypa hennara bók, og hon er eisini fantastiska góð, staðfestir Jóhanna.

Jastrid vísir somuleiðis á, at fert tú uttanlands, so eru tíggjtals kakubøkur á hyllunum. Í Føroyum eru bara tvær, og hóast tær komu um somu tíð, so skuldi marknaður verið fyri báðum.

### Ætlanir og dreymar

– Hvørjaferð vit hava lagt seinastu hond á eina bók, hava vit havt fult av hugskotum til næstu bókina. Og hendan bókin er einki undantak í so máta. Vit hava longu gjørt okkum tankar um eina bók afturat, men nú skulu vit fyrst njóta, at hendan bókin er komin út, og at hon eisini selir so væl, staðfestir Elisabeth.

– Vit gera hesar bøkurnar í okkara frítíð, so tað er avmarkað hvussu stóra orku vit hava. Tað krevur eisini nógv av baklandinum, tá vit arbeiða við bókunum, so tey mugu eisini takast við uppá ráð, vísir Jóhanna á. – Men hetta er so stuttligt og spennandi arbeiði, sum næstan er blivin ein lívsstílur hjá okkum eftirhondini. So tað kundi meiri enn so hent, at tað kemur ein bók frá okkum afturat, sigur hon.

Áhugin fyri "Lætt og leskiligt" 1 og 2, og nú eisini "Søtt og leskiligt" er ikki bara stórur í Føroyum. Útlendingar hava somuleiðis sýnt bókunum ans, og hava eggjað høvundunum til at geva út uttanlands.

Jastrid vísir á, at bøkurnar eru so dygdargóðar og flottar, at tær saktans kundu selt uttanlands eisini.

– Sjálvandi hevði tað verið stuttligt, men tað krevur væl meiri at fara uttanlands við bókunum, og vit hava báðar fulltíðarstarv. So nú fáa vit at síggja, sigur Elisabeth.

*Eydna Skaale*
*eydnaskaale@hotmail.com*

